Nr.

Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum
(Broyting í heitinum, innsetan av veitingum og tekniskar broytingar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 145 frá 13. desember 2019, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"**Løgtingslóg um áseting av almannaveitingum**"

2. § 1 verður orðað soleiðis:

"**§ 1.** Henda lóg um áseting av almannaveitingum er givin út sambært § 1, stk. 2, nr. 2 og 7 í ríkislóg nr. 315 frá 17. mai 1995 "om sociale ydelser på Færøerne"."

3. § 2, 1. pkt. verður orðað soleiðis: "Almannaveitingar sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjonistar v.fl., løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl., løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk verða árliga javnaðar sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar."

4. Í § 3 verða sum nr. 4 og 5 sett:

"4) Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur:

	Byrjanarár	Kr.
Hægsta uppihalds-veiting	2021	18.552 (mánaðarliga)

5) Løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk:

	Byrjanarár	Kr.
Hægsta uppihalds-veiting	2021	18.552 (mánaðarliga)

"

5. Í § 4, stk. 1-4 verður "forsorgarlógini" broytt til: "løgtingslóg um almannatrygd og tænastur".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri útgjald av veitingum frá og við januar 2021.

Samtykt á Løgtingi hin 12. desember 2020 við 29-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Konfererað við tað samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 11. desember 2020

stjóri

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

LM-049/2020